# SÁTTMÁLI UM VIDEOKERVIÐ TIL VANGAN

**millum**

**Gjaldstovuna**

**og**

[Veitari]

TALGILDU FØROYAR 01100110 01101111

## Innihald

1 INNGANGUR ........ 3
1.1 SÁTTMÁLAPARTAR ........ 3
1.2 FYLGISKJØL ........ 4
2 VEITINGIN ........ 4
2.1 VEITINGIN ........ 4
3 GJALDSTREYTIR ........ 4
4 SAMSTARV ........ 4
4.1 SAMSTARVSFYRISKIPAN ........ 4
4.2 NÝTSLA AV UNDIRVEITARUM ........ 5
4.3 ÁRLIGUR SAMSTARVSFUNDUR ........ 5
4.4 SERVICE LEVEL AGREEMENT (SLA) ........ 5
5 YMISKT ........ 5
5.1 DÁTUVIÐGERÐ ........ 5
5.2 KT-TRYGD ........ 5
5.2 MISHALD ........ 6
5.2.1 MISHALD FRÁ VEITARA ........ 6
5.2.2 MISHALD FRÁ KUNDA ........ 6
5.2.3 ENDURGJALD ........ 7
5.3 ORGANISATORISK VIÐURSKIFTIR HJÁ VEITARA ........ 7
6 FORCE MAJEURE ........ 7
7 INNLIT, EFTIRLIT OG GRANNSKOÐANARVÁTTANIR ........ 7
7.1 KUNDANS ATGONGD TIL INNLIT OG EFTIRLIT ........ 7
7.2 GRANNSKOÐAN VIÐVÍKJANDI KT-TRYGD OG PERSÓNSUPPLÝSINGUM ........ 7
7.3 SERSTØK KT-GRANNSKOÐAN UMBIÐIN AV KUNDA ........ 8
8 RÆTTINDI ........ 8
8.1 UPPRUNA RÆTTINDI ........ 8
9 TAGNARSKYLDA ........ 8
10 TULKINGAR ........ 8
12 TRÆTUR ........ 9

13 AVHENDING AV SÁTTMÁLANUM ..... 9
14 UPPATHALD ..... 9
15 GILDISKOMA, GILDISTÍÐ OG UPPSØGN ..... 9
16 UNDIRSKRIFT ..... 10

# 1 INNGANGUR

Endamálið við hesum sáttmála er at lýsa sambond og skyldur partanna millum, so partarnir eru samdir um tað, teir vænta sær hvør av øðrum. Samstundis verða í hesum sáttmála reglur ásettar fyri, hvussu partarnir skulu virka hvør mótvegis øðrum, skuldi eitthvørt ikki gingið eftir ætlan.

## 1.1 SÁTTMÁLAPARTAR

Sáttmálapartarnir eru:

**Gjaldstovan**

Kvíggjartún 1

FO 160 Argir

V-tal: 343269

(hereftir nevndur Kundin)

og

**X P/F**

Gøta nr

Adressa

Post nr. by

V-tal:

(hereftir nevndur Veitarin)

## 1.2 FYLGISKJØL

Hesin sáttmáli fevnir eisini um fylgjandi fylgiskjøl:

| | |
|---|---|
| **Fylgiskjal 1** | Útboðsskjal |
| **Fylgiskjal 2a** | Krøv |
| **Fylgiskjal 2b** | Krøv og prísir, veitarans svar |
| **Fylgiskjal 3** | Kt-trygdarkrøv |
| **Fylgiskjal 4** | Service Level Agreement |
| **Fylgiskjal 5** | Dátuverdaravtala |

# 2 VEITINGIN

## 2.1 VEITINGIN

Veitingin er lýst í útboðsskjalinum, fylgiskjali 1, og kravskjalinum, fylgiskjal 2 a og b.

# 3 PRÍSIR OG GJALDSTREYTIR

Prísir framganga av fylgiskjali 2b. Veitarin sendir rokningar:

- einnýtis fyri verkseting av videokervinum
- mánaðarlig fyri nýtslu og rakstur av videokervinum

Kundin rindar mánaðarliga.

Rokningar skulu vera sendar elektroniskt til EAN-nr. 5797100000010.

Rokningar falla til gjaldingar 28 dagar eftir at rokningin er dagfest. Er gjaldið seinkað, kann veitarin skriva morarentur eftir reglunum í rentulógini um tað.

# 4 SAMSTARV

## 4.1 SAMSTARVSFYRISKIPAN

Partarnir skulu stremba eftir at samstarva á ein jaligan, professionellan og ábyrgdarfullan hátt, við greidleika í tekst og talu í øllum viðurskiftum, umframt hvør sær at arbeiða fyri at røkka best møguliga úrslitinum.

Partarnir skulu harafturat støðugt kunna hvønn annan um alt, sum kann hava týdning fyri veitingar knýttar at hesum sáttmála, t.d. týðiligar feilir í arbeiðinum hjá hinum partinum, uppgávur, framdrátt, og trygdar- og rakstrahendingar.

Partarnir eru professionellir og proaktivir, ið virka samstarvinum at frama í tilgongdini til rakstur og fakliga vegleiðing.

## 4.2 NÝTSLA AV UNDIRVEITARUM

Samstarvsfelagar hjá Veitaranum, ið hjálpa til við veitingum og fremja veitingar knýttar at hesum sáttmála, verða roknaðir sum undirveitarar.

Brúk av undirveitarum avmarkar á ongan hátt ábyrgdina hjá Veitaranum at lúka krøvini ásett í hesum sáttmála. Veitarin heftir sum útgangsstøði fyri allar veitingar frá undirveitarum á sama hátt sum fyri sínar egnu veitingar og viðurskifti annars.

Veitarin kann ikki, uttan samtykki frá Kundanum, lata veitingar til aðrar undirveitarar. Kundin kann ikki nokta hesum uttan sakliga grundgeving.

Veitarin skal skjótast gjørligt boða Kundanum frá, um samstarv við undirveitara steðgar.

## 4.3 ÁRLIGUR SAMSTARVSFUNDUR

Tað skal haldast ein árligur strategifundur, har øll viðurskifti í sáttmálanum, samstarvinum sum heild og nýggjar funkur og møguleikar verða viðgjørdir.

## 4.4 SERVICE LEVEL AGREEMENT (SLA)

Veitarin skal lúka krøvini til tænastustig sambært SLA, fylgiskjal 4.

# 5 YMISKT

## 5.1 DÁTUVIÐGERÐ

Í mun til teir persónsupplýsingar, ið verða viðgjørdar, sum liður í veitingum knýttar at hesum sáttmála, er Kundin dátuábyrgdari og Veitarin er dátuviðgeri.

Veitarin, skal sum partur av hesum sáttmála, lúka krøvini í dátuviðgerðaravtaluni, fylgiskjali 5.

## 5.2 KT-TRYGD

Veitarin og møguligir undirveitarar hjá hesum skulu lúka krøv um KT trygd, sum ásett í fylgiskjali 3.

## 5.2 MISHALD

Um ikki annað fylgir av hesum sáttmála, galda vanligar føroyskar reglur fyri mishald og tilhoyrandi mishaldaheimildir.

### 5.2.1 MISHALD FRÁ VEITARA

Mishald er, um Veitarin ikki letur veiting til ásettu tíð (seinkan) ella í samsvari við ásett krøv (mangul) í hesum sáttmála.

Uttan mun til orsøk til mishaldið, skal Veitarin beinanvegin fráboða Kundanum, at Veitarin væntar ella veit, at mishald fer ella er farið fram. Henda fráboðan skal innihalda upplýsingar um orsøkina til mishaldið og væntandi avleiðingar av mishaldinum.

Saman við hesi fráboðan skal fylgja ein umbøtingarætlan, har Veitarin greiðir frá, hvørjir trupulleikar kunnu standast av mishaldinum og uppskot til handfaring av mishaldinum.

Kundin kann ógilda sáttmálan heilt ella partvíst, um týðandi mishald hevur verið. Kundin kann harumframt krevja endurgjald fyri tann skaðan, ið Kundin kann skjalprógva í hesum sambandi. Fyri at ógilda vegna mangul er tað ein treyt, at tørvurin innan fyri rímiliga tíð ikki er bøttur, sum skal metast í mun til týdningin av tørvinum og skyldur Veitarans.

Dømir um týðandi mishald eru:

Avtalaða uppitíðin verður ikki hildin í eitt longri samanhangandi tíðarskeið ella ikki er hildin í fleiri umførum yvir eitt longri tíðarskeið.

Veitarin brýtur týðandi trygdarmannagongdir.

Veitarin brýtur tagnarskylduna sbrt. sáttmálanum.

Veitarin í týðandi mun ikki lýkur krøv í dátuverndarlógini og dátuviðgerðaravtalu sbrt. fylgiskjali 5.

Veitarin fer á húsagang ella byrja samráðingar um akkord.

Ognarviðurskiftini hjá Veitaranum føra við sær, at mett verður, at Veitarin ikki kann lúka treytirnar í sáttmálanum.

### 5.2.2 MISHALD FRÁ KUNDA

Mishald er um Kundin ikki rindar til tíðina ella brýtur tagnarskylduna sbrt. sáttmálanum. Týðandi mishald er um Kundin yvir fleiri gjaldsfreistir ikki rindar til tíðina.

Er gjaldið seinkað, kann veitarin skriva morarentur eftir reglunum í rentulógini um tað.

Veitarin kann ógilda sáttmálan, um týðandi mishald hevur verið vegna vantandi gjalding frá Kundanum.

Veitarin kann tó bert ógilda sáttmálan, um Veitarin frammanundan hevur fráboðað Kundanum, at Kundin í týðandi mun hevur mishildið sínar gjaldsskyldur og givið eina ávaring á 40 dagar at fáa hetta í rættlag. Um Kundin innanfyri hesar 40 dagar fráboðar Veitaranum, at kravið verður mett sum óheimilað, skal Veitarin innan 30 dagar seta í verk mannagongd fyri at loysa trætuna við gerðarætti sbrt. grein 12. Um Veitarin ikki setur í verk hesa mannagongd, kann Veitarin ikki ógilda sáttmálan vegna vantandi gjald.

### 5.2.3 ENDURGJALD

Kundin átekur sær ikki endurgjaldsskyldu í tann mun, hetta er loyvt sambært galdandi rætti. Partarnir kunnu ikki ábyrgdast fyri óbeinleiðis tap hjá hvør øðrum. Sum óbeinleiðis tap verður tó ikki roknað:

- Missur av dátum, og hetta skyldast, at Veitarin ikki lýkur rakstrarkrøv
- Keyp, ið fevnir um skaða (dækningskøb)

## 5.3 ORGANISATORISK VIÐURSKIFTIR HJÁ VEITARA

Veitarin skal tryggja, at nóg nógv starvsfólk eru fakliga før fyri at røkja uppgávurnar, ið eru partur av hesum sáttmála sum heild, bæði organisatoriskt, KT-trygdarliga, tøkniliga og í aðrar mátar.

# 6 FORCE MAJEURE

Hvørki Kundin ella Veitarin kunnu ábyrgdast fyri ikki at uppfylla krøvini í hesum sáttmála, tá atvoldin er eitthvørt, sum partarnir ikki hava nakra ávirkan á.

Báðir partar skulu tó viðvirka til at avmarka og fyribyrgja avleiðingarnar av force majeure.

# 7 INNLIT, EFTIRLIT OG GRANNSKOÐANARVÁTTANIR

## 7.1 KUNDANS ATGONGD TIL INNLIT OG EFTIRLIT

Kundin hevur rætt til at fáa innlit í veitingarnar frá Veitaranum fyri at staðfesta, hvørt Veitarin lýkur krøvini í hesum sáttmála.

## 7.2 GRANNSKOÐAN VIÐVÍKJANDI KT-TRYGD OG PERSÓNSUPPLÝSINGUM

Í minsta lagi eina ferð um árið skal Veitarin grannskoðast av løggildugum grannskoðara upp í móti krøvunum í hesum sáttmála við fylgiskjølum um KT-trygd og persónsdátuvernd.

Grannskoðarin skal hava fría atgongd til at útinna grannskoðanina og frítt ræði á neyðugum amboðum, upplýsingum og dátum í tí sambandi.

Veitarin skal árliga lata Kundanum grannskoðaraváttan um KT trygdina, sum er grundað á krøv í hesum sáttmála við fylgiskjølum um KT-trygd og persónsdátuvernd, p.t. er talan um eina ISAE 3000 váttan ella liknandi. Váttanin kann vera ein samlað váttan fyri fleiri loysnir hjá Kundanum.

### 7.3 SERSTØK KT-GRANNSKOÐAN UMBIÐIN AV KUNDA

Serstøk KT-grannskoðan av veitingunum knýttar at hesum sáttmála kann vera framd av einum av Kundanum útvaldum skikkaðum triðjamanni (auditor).

Serstaka KT-grannskoðanin skal sum útgangsstøði fráboðast minst 10 arbeiðsdagar frammanundan.

Partarnir skulu í rímiligan mun og uttan gjald veita KT-grannskoðaranum ta hjálp, ið er neyðug fyri at fremja grannskoðanina, undir hesum geva atgongd til viðkomandi hølir og upplýsingar.

Kostnaðurin fyri slíka serstaka KT-grannskoðan verður goldin av Kundanum.

## 8 RÆTTINDI

### 8.1 UPPRUNA RÆTTINDI

Partarnir varðveita øll immateriel rættindi, sum partarnir hava í varðveitslu, tá ið hesin sáttmáli verður galdandi.

Partarnir fáa brúksrætt til neyðug forrit og skipanir og tílíkt hjá hvørjum øðrum, fyri at partarnir, uttan eyka kostnað, kunnu lúka krøvini í hesum sáttmála. Brúksrætturin er avmarkaður til veitingar knýttar at hesum sáttmála og fara úr gildi, tá hesin sáttmáli fer úr gildi.

## 9 TAGNARSKYLDA

Veitarin og starvsfólk teirra, undirveitarar og starvsfólk teirra, ráðgevar og onnur, við veitingum knýttar at hesum sáttmála hava tagnarskyldu við atliti til upplýsingar, ið tey verða kunnug við í teirra uppgávum fyri Kundan. Kundin og starvsfólk teirra, við veitingum knýttar at hesum sáttmála hava tagnarskyldu við atliti til upplýsingar, ið tey verða kunnug við í teirra uppgávum við Veitaran.

## 10 TULKINGAR

Hesin sáttmálin hevur forrættindi fram um fylgiskjølini.

Tá ið skyldur Veitarans eftir hesum sáttmála verða tulkaðar, skal fyrilit takast fyri upplýsingum, ið eru skiftar partanna millum, áðrenn sáttmálin varð settur í gildi, eitt nú men ikki avmarkað til tilboð frá veitaranum og møguligum samráðingum í útboðstíðarskeiðinum.

# 12 TRÆTUR

Tekur ósemja seg upp ímillum partarnar, sum ikki ber til at loysa beinanvegin, skal boðast til samráðingar millum stjórarnar hjá pørtunum,

Kann trætan ikki loysast við samráðingum, skulu partarnir kanna møguleikan um seming.

Fæst eingin loysn í sátt og semju, verður trætan loyst við vanligum rættarmáli. Føroyskur rættur er galdandi.

# 13 AVHENDING AV SÁTTMÁLANUM

Veitarin hevur ikki uttan skrivliga váttan frá Kundanum rætt til at avhenda rættindi og skyldur sbrt. hesum sáttmála.

Kundin kann, uttan samtykki frá Veitaranum, avhenda rættindi og skyldur sbrt. hesum sáttmála, um uppgávur verða fluttar ella umskipaðar til annan almennan stovn, verða einskildar ella líknandi.

# 14 UPPATHALD

Við uppathald av hesum sáttmála, óansæð orsøk, skal Veitarin hjálpa Kundanum at heimtaka og/ella avhenda til Kundan, annan veitara ella myndugleika.

Veitarin skal harumframt loyalt hjálpa Kundanum í sambandi við eitt møguligt nýtt útboð og í rímiligan og neyðugan mun samstarva við ein møguligan nýggjan veitara í sambandi við avhending av veitingum í hesum sáttmála til henda.

# 15 GILDISKOMA, GILDISTÍÐ OG UPPSØGN

Hesin sáttmáli kemur í gildi við undirskrift av báðum pørtum tann XX.XX.XXXX og gongur 3 ár fram til og við tann XX.XX.XXXX, við møguleika fyri at leingja.

Uppsøgn av sáttmálanum kann av Kundanum gerast heilt ella partvíst við 6 mánaða skrivligari fráboðan til tann fyrsta í einum mánaði.

Uppsøgn av sáttmálanum kann av Veitaranum gerast heilt ella partvíst við 12 mánaða skrivligari fráboðan til tann fyrsta í einum mánaði.

# 16 UNDIRSKRIFT

**Vegna Kundan**

Argir, tann xx.xx.xxxx

Leif Abrahamsen, stjóri

Undirskrift:

**Vegna Veitaran**

Stað, tann xx.xx.xxxx

xxx

Undirskrift: